

Heimasíðan hjá norska oljugrunninum seinnapartin.

# Norðmenn ongantíð átt so nógvar pengar á bók sum í dag

**Jógvan Hugo Gardar**

13.03.2015 - 23:02

Oljan.fo

Virði á norska Oljugrunninum fór seinnapartin uppum 7000 milliardir norskar krónur. Hetta stendur at lesa á heimasíðuni hjá grunninum.

Meðan oljuprísurin hevur verið lágur hetta farna hálva árið, so veksur grunnurin sum skal tryggja norsku vælferðina hjá komandi ættarliðum. Í november fór grunnurin á fyrsta sinni uppum 6000 milliardir krónur, og nú góðar tríggjar mánaðir seinni eru 1000 milliardir komnar afturat í grunnin. Til samanberingar tók tað nærum eitt ár at økja um sparingina úr 5000 milliardum til 6000 milliardir.

Um hetta verður býtt út á hvønn einstakan íbúgva í Noregi, so eru 1,35 milliónir krónur til hvønn á bók í Oljugrunninum.

31. desember 2014 stóðu 6431 milliardir kónur í grunninum.

Norski oljugrunnurin er nú tann størsti av sínum slag í heiminum.